# Frits í Oynni á Tvøroyri



Snjósóljugentan

**Hendan mánaðin sýrnir Frits Johannesen í Fuglafirði fram í Gallerí Oynni á Tvøroyri**

LIST

At vera í tí tóma rúminum við einum pensli, kanst tú tulka í litum, har hugskotið til málningin kann takast úr luftini, líðunum, homrunum, gjáunum, fjallatindunum úr eygunum á børnum og Snjósóljugentuni - árla og síðla. Í gjáarmunnanum er tignarligt. Ljósið spælir sær kring fjallagreinirnar og leggur seg á vágna í ymiskum dragi, sum pensilin fangar í strokum. Hetta er í løtum, sum tú tíðum vendir aftur til. Ovast uppi er ljósið - sum spælir sær t. d. í gjáarmunnanum í Mansgjógv uppi í Blábjørgum , og endurspeglar sær í einari kvinnu við einari cello - ein skulpturur, sum er at undrast yvir.

Henda mussika løtan, sum ljómur í litum - er spæl í tónum, har Snjósóljugentan í Mansgjógv er ein undurføgur standmynd, ið spælir á eina cello, ið ber tónar og løg kring tann víða heim. Hon er eitt kosmiskt fyribrygdi, sum fevnir um alt í ljósi, í tónum og spæli. Lívið í gjáum er ein poetisk tilvera, sum øll undrast yvir, ja, sjálvt Snjósóljan og mortítlingurin eru undirgivin hesari útsøgn. Cellospælarnir í hinum gjáunum eru samdir við snjó-sóljugentuna og mortítlingin í hesum.

Alt hetta kundi eisni verið á Gøtu sandi, nú G-fagnaðurin er í ljósmála. Poppsangarin í Hagagjógv (Grand Prix) er so skulpturellur, at hann er sum høgdur úr einum palli, men hann er í einari gjógv ovast uppi og letur sínar tónar fara út um tann víða heim- í flyrrandi tónum og heilsar G- fagnaðinum.

Myrkalagt er í Múla, men hóast tað, er ljósið í summar-, heyst-, vetrar- og várløtum tað sama. Húsini eru standmyndir, sum standa ritaðir í fjallasíðurnar - hella seg aftur at fjallinum og eru eitt við megnar standmyndina fjallið. Sjálvt Fjallatussin á Gjógv-araáfjalli er ein einfaldur tónleikari, sum eftir eina stravna konsert ovast uppi, smýlist og samtykkir tað, at fjallið er ein standmynd - ja, at fjøllini eru standmyndir, og hjartans hugsan og trá teirra rópar til himmals í ævigum tónum, sum fjallatussin hevur tulkað á sínum ljóðføri.

Kenslusomu myndirnar Divotu er 1 og 2 eru jødar, sum leika á ljóðføri og spæla Mozart. Teir eru staddir í Auschwitz og Birkennau. Orkestur-leiðarin í Divotu 2 er krossfestur við einum vindli í munnvikanum. Hann stýrir øllum orkestrinum, er gerandisligur og so ómetaliga líkasælur við sigarett í munninum. Tað at týna og verða týndur kann gerast so vanligt, - ja, so vanligt, sum at hava eina sigarett í munninum, og fer hetta farm dag og dagliga um tann víða heim. Á krossinum er skyldrið:WWW.

Tá ið gingið verður húsanna millum í einari gamlari føroyskari bygd, síggjast bert hálvir skjøldrar og hálv vindeygu. Skjøldrarnir eru fullkomin skap og somuleiðis vindeyguni, men alt fer um tíðina, sum melur í stýrinum ella hjólinum um ein húsavegg ella kirkjuvegg. Húsini, sum eru standmyndir - gera bygdina til eina heild, hóast eygað bert sær hálvar skjøldrar, hálv vindeygu, hálvar skorsteinar og hálvt stýri. Hetta er eitt úrdrag, sum er so rót føroyskt, sum tað kann vera.

Sluppmanningin og útróðrarmaðurin eru livandi standmyndir, sum eru høgdar út úr tí føroyska umhvørvinum. Keppurin er tann føroyski " skulptururin". Eingin er líka, og hava teir fingið sítt persónliga skap eftir høvur mansins. Hann er ein avspegling av hansara sál. Tað hevði verið nóg mikið bert at mála kepparnar. Tað hevði eisini gjørt málningin.



Snjósóljugentan uppi í Mansgjógv á Blábjørgum

Næmingarnir eru spyrjandi og leitandi. Tá ið teir vóru so "snúsfornuftigur" var tað, tí at abbin var so klókur. Hin vegin, tá ið tað reystaði nakað í, so var orsøkin, at lærarin var so vánaligur. Men næmingaeyguni leitaðu eftir tí, sum teir hildu var nóg mikið til hetta jarðiska lívið. Flestu næmingarnir eru blivnir góðir samfelagsborgarar... og tað liggur í eygunum ella undir keppatútinum, sum tú sært.

Málningaframsýningin røkkur um fjallagreinar í tónum og løgum, sum ljóma úr einum cellokassa, men undrandi standa vit, tá ið brimið stendur í grasi, og ódnin reikar um bygdir og firðir, sum myndin av Hvalbiareiðið ber boð um. At standa oman brim og ikki kunna flota bát, kenna føroyingar til. Hetta røkkur um nes og tangar frá norðasta oddi í Føroyum til Akraberg. Hetta eru tónar, sum eru tulkaðir í skaldskapi, tónleiki og myndum.

Hetta var ein lítil lýsing av myndunum hjá Frits Johannesen, sum hevur listaframsýning í Gallerí Oynni til 31juli. Vert er at støkka inn á gólvið í Gallerí Oynni og fara eina ferð í myndum hansara, sum eru poetiskar og skulpturellar. Tær verður ynskt eina góða ferð, saman við málningunum í tí tóma rúminum.



Snjósóljugentan á Gjógvaráfjalli við Kallinum í baksýni



# Kvívík - Í túsund ár



Her vestan av landi teir segl lótu falla
og út rann av ketum sum akkeri bar
Í lyftingi stendur hann, høvding teir kalla
av Skallagrímsslagnum hann ættborðin var.
Tey boð tit nú skipsfelagar her hoyra fella !
Sjá her fyri framman hin blálitta hella
vit taka her land og her byggja vit garð.

Tá mælti hann "Egil" tit føri til landa
alt tað sum á Knørrinum livandi er.
Her vestan av ánni várt stórtjald skal standa,
tey minnu vit reisa í nándini her.
Várt fena vit reka á grasgrønan haga
og lagaligt er yvir ánna at vaða
sum smidlig á víkina fer

Sjá fjart fyri framman seg hevjar úr dali
eitt fjall fyri norðan tað ogni eg mær.
Várt vartekin verða tað skal yvir vali
tí Egilsfjall verður júst navnið tað fær.
Tað stavnhald úr suðri tað altíð skal verða.
Ein varði um ogn og várt markatal bera
so leingi vit her verja garð

Tað fløðir og fjarar at grávaksnum gjari,
smátt skolar um grønlitta hellu og sker.
Við strondina situr ein svartfuglaskari
ein undrandi flokkur ið spyrjandi er
tí her hevur mannamál áður ei ljóða
bert brimaldan her hevur runga og sjóða
og ýlandi stormar á ferð.

Her mólu við strondina bular og skrokkar
og ráðbleik av reka var urin at sjá
her almiklar klótur og dimmlittir stokkar
og siglingstrø mikil evst rokanum á
á land hevði rikið sum øldirnar runnu
ein fongur sum landnámsmenn hepnir her funnu
og við teirra føtur hann lá

Tá kyndur var eldur tann fyrsti á staðnum
og dimmgráa guðan mót loftinum lá.
Tá birtist tann glóð sum vit hoyra úr kvæðnum
sum sigld var um havið fjart eystanífra.
Tá grunda var Kvívík og enn roðar glóðin
sum fedrarnir kyndu og her liggur slóðin
tað søga og søgn boðar frá

Her stendur várt bakland og her liggur lendi
í ótald árhundrað tey húsaðust her
og øld eftir øld tað á grúgvunum brendi
til dagin í dag her í okkara verð.
Frá víkingasynum er rót vár at rokna
og ikki er eikin sjálv " Kvívíkin " hokna
og valla í bræði hon fer.

Vit eiga til felags at her er várt upphav
og vøggan hon gekk yvir fjalunum her.
Tann norrøna rót ið kom eystan av havi
væl sprottin í okkum tann kvisturin er.
Lat okkum tí æra tann arv ið vit fingu
og fylgja tí slóð sum her fedrarnir gingu
til dagur vár aftnar og fer.

Tann dag ið vit seinast her fara til ferða
og greinin er fallin av rótini her.
Norð til várar frændir teir okkum tá bera,
sum heiman vert heyggjin í Fornanum er
Har sevið og grasið oss lívd skulu gerast,
har vestfallið skamt undir helluni ferðast
vær seinastu kvøður tá ber.

**Uppi í Trøð**
**Viggo Johannesen**

# Mpiri konsertir í Føroyum

Tíðindaskriv

Undir yvirskriftini 'Ørskapur' fór kamarkórið Mpiri í vár undir eina nýggja konsertferð. Eftir tvær væleydnaðar konsertir í Århus Kunstbygning og Rundatorni í Keypmannahavn leggur kórið nú leiðina til Føroya. Kórið hevur samansett eina konsertskrá við verkum, ið á ein ella annan hátt hava okkurt ørt í sær. Ein svakur tekstur, eitt vitleyst tónaskald ella líknandi.

**Konsertirnar í Føroyum verða:**

Týskvøldið 22. juli kl. 19 í Fríðrikskirkjuni á Nesi.

Mikukvøldið 23. juli kl. 19 í Kommunuskúlahøllini í Havn.

Mpiri hevur sum eitt av aðalmálum sínum at virka fyri at fáa til vega nýggjan føroyskan kórtónleik. Hetta mál hevur kórið tikið í álvara og hevur seinastu árini bílagt fleiri nýggj verk frá føroyskum tónaskøldum so sum Kára Bæk, Paula í Sandagerði, Kristiani Blak og Tróndi Bogasyni. Tróndur Bogason syngur tenor í kórinum og hevur, síðani kórið varð stovnað, skrivað 7 verk til kórið. Frumframførslur hava tí verið javnan at hoyra á konsertum kórsins.

Ein frumframførsla er eisini á skránni á konsertferðini. Tað er verkið 'Tanngulilalei' hjá Tróndi Bogsasyni. Heitið er ein góð ábending um, hvat kann væntast til konsertirnar hjá Mpiri. Umframt hetta verkið syngur kórið verk eftir øra italska fúrstanum Carlo Gesualdo da Venosa, sum livdi í renesansuni, og sum gjørdist svakur eftir at hava myrt konu sína og elskara hennara. Restina av lívi sínum brúkti hann til at pína seg sjálvan og skriva løgnan tónleik. Gesualdo var tó samstundis ótrúliga dugnaligur, so hesin tónleikurin verður í dag mettur sum nakað av tí mest spennandi og nýskapandi úr seinni helvt av renesansuni.

Eisini eru verk við, sum danska tónaskaldið Per Nørgård hevur gjørt til tekstir hjá sveitsiska fjøllistamanninum Adolph Wölfli, ið mesta av lívi sínum var læstur inni á sinnissjúkrahúsi. Tekstirnir eru vakrir og vitleysir í senn og tað sama er tónleikurin, ið er settur til.

Kórleiðari er danin Gorm Larsen, ið er úbúgvin kór- og orkesturleiðari á Kongaliga Danska Tónleikakonservatoriinum. Hann hevur eisini lært á Royal College of Music í London og lisið Tónleikavísund á Universitetinum í Århus.

Í sambandi við konsertirnar ber eisini til at keypa nýggju fløguna hjá kórinum fyri 100 kr. Fløgan 'Asbest' savnar tann føroyska nýskrivaða tónleikin, sum kórið hevur sungið hesi 5 árini, tað hevur verið til.

Lesið meira um kórið á heimasíðuni www.mpiri.org .

Myndir av kórinum til fjølmiðlar (í ymsari støðd og upploysingi) eru at finna á heimasíðuni undir 'annað'.

Fyri meira kunning um konsertirnar/fløguna, skrivið til danial@mpiri.org (ella ringið: 508023.

# Sólarmagn á kórvitjan í Írlandi

SANGFERÐ

*Tíðindaskriv*

Kórið Sólarmagn, sum er mannað av sangarum av Velbastað og úr Kirkjubø, skal á kórvitjan í Írlandi í døgunum 7. til 14. august. Kórið, sum hevur vant nógv til ferðina seinastu mánaðarnar, fer í hesum sambandi at skipa fyri stórum tiltakið á Velbastaðhálsi leygardagin frá kl. 10.

Um veðrið ikki verður til vildar, verður tiltakið flutt út í vakstrarhúsið í Dølum - sum liggur millum bygdirnar báðar, Velbastað og Kirkjubø. Umframt at kórið fer at syngja, er ein fjøltáttað skrá sum boðar frá forkunnugum og hugnaligum tilboðum til øll, ung sum gomul.

Kórlimirnir hava ruddað loft og kjallarar, og savnað alskins lutir til loppumarknað. Børnini kunnu fiska sær eina gávu í Stjórutjørn, verða málað í andlitinum, sleppa ein túr á hestabaki ella hoppa í hoppiborgini. Harumframt verður stór burturluting við fimmti megnar vinningum, so sum leikum, kurvum, kjøti og mongum øðrum. Neytamykjukappingin, sum skuldi vera fyrr í hesum mánaðinum, verður avgreidd, og seðlar kunnu eisini keypast eina løtu leygardagin. Gerast fólk svong, fæst okkurt gott til matna av grillini, og kaffi og køkur fáast til keyps.

Summarhugnin á Velbastaðhálsi verður nú leygardagin kl. 10 og kórið minnir fólk á at skøða seg eftir umstøðunum. Tí, hóast summarið er komið, eru gummistivlarnir altíð góðir, tá farið verður í hagan.